t.e.

# Álit

# um

# arbeiðsskapandi politikk

Arbeiðsbólkurin settur 27. september 1994 at arbeiða við arbeiðsskapandi politikki

Tórshavn 21. november 1994

# Innihaldsyvirlit

**Fororð** . . . . . 2

**1. Inngangur** . . . . . 3

1.1 Ónda ringrásin . . . . . 3

1.2 Kann lið gerast í ringrásini? . . . . . 4

1.3 Kapitalviðurskifti/fíggjar- og fíggingarviðurskifti . . . . . 5

1.4 Eginogn . . . . . 6

1.5 Tveir møguleikar at útvega meira váðafúsan eginkapital . . . . . 7

1.6 Fremmandafíggingin . . . . . 12

1.7 Leiðsla og marknaður . . . . . 14

1.8 Skattaendurgjald fyri nýggjar vinnur . . . . . 16

**Ítøkilig uppskot** . . . . . 18

**2. Skattafrádráttur fyri partapening** . . . . . 19

2.1 Generelt um tílíkan frádrátt . . . . . 19

2.2 Umsitingarligir spurningar . . . . . 21

2.2 Krøv í partafelagslógini um hækking av partapeningi . . . . . 23

2.4 Kautiónstap og tap stavandi frá láni til vinnuvirki . . . . . 23

2.5 Lógaruppskot . . . . . 23

**3. Framtaksfelag** . . . . . 26

**4. Samskipan av verandi og nýggjum skipanum** . . . . . 28

4.1 Verandi skipanir . . . . . 28

4.2 Felags umsiting . . . . . 28

**5. Skattaendurgjald fyri nýggjar vinnur** . . . . . 31

5.1 Nýggjar vinnur . . . . . 31

5.2 Eftirlit . . . . . 33

5.3 Umsiting . . . . . 34

5.4 Alternativ . . . . . 34

**Skjøl** . . . . . 35

# Fororð

Við hesum letur arbeiðsbólkurin, sum varð settur 27. september 1994 av landsstýrinum at arbeiða við arbeiðsskapandi politikki, álit sítt.

Hesir limir vórðu valdir í arbeiðsbólkin:

Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóri
Jalgrím Hilduberg, skrivstovustjóri
Kári Petersen, fíggjarstjóri
Petur Alberg Lamhauge, stjóri á Toll- og Skattstovuni
Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovuni
Arne Poulsen, felagsskrivari

Kári Petersen mátti taka seg burtur úr nevndini, tí hann fekk álagt aðrar átrokandi arbeiðsuppgávur.

Nevndin setti Ullu Svarrer Wang, fulltrúa, sum skrivara.

Arbeiðssetningurin fevndi um at kanna og gera tilmæli um hesi mál:

1. Skattaendurgjald fyri nýggjar vinnur.
2. Skattafrádráttur fyri partapening.
3. Nýtslan av játtanum á fíggjarlógini til arbeiðsskapandi endamál.
4. Lánimøguleikar úr Íleggingargrunninum fyri Føroyar.

# 1. Inngangur

Á fundi tann 27. september 1994 hevur landsstýrið valt limir í ein arbeiðsbólk at arbeiða við einum arbeiðsskapandi politikki. Í arbeiðsbólkin eru valdir limir, sum hava rættiliga nógvar aðrar arbeiðsuppgávur í løtuni, sum illa kunnu raðfestast afturum. Á fundi við landsstýrið hevur bólkurin fingið álagt, at málið hevur serligan skund, og uppskot skulu fyriliggja væl fyri árslok at leggja fyri løgtingið. Kravt má vera, at arbeiðsskapandi politikkurin, ið mælt verður til at reka, loysir trupulleikarnar í rættari raðfylgju og undirbyggir eina ynskta framtíðar gongd. Hitt øvugta - afturstig ella spell av avmarkaðu peningaorkuni í landinum - kann ikki koma upp á tal.

Arbeiðsbólkurin er á einum máli við landstýrið, at neyðugt er at koma í gongd og bróta ta óndu ringrás, føroyski búskapurin er í, og sum helst skrúvar búskapin longur niður enn náttúrligu leguna undir núverandi umstøðunum. Eisini, at møgulig lógaruppskot og/ella ábøtur á núverandi lógir mugu vera so, at tær kunnu umsitast og stuðla upp undir endamálini.

## 1.1 Ónda ringrásin

Endamálið við arbeiðsskapandi politikkinum má vera, at tað almenna gjøgnum henda politikkin skilvíst fremur tiltøk, ið kunnu menna skapanina av arbeiðsplássum í privatari vinnu. Arbeiðsbólkurin hevur skilt, at í arbeiðssetninginum liggur ikki arbeiði einans fyri arbeiðsins skuld, sum meira er ein sosialur spurningur. Trygg arbeiðspláss í privatari vinnu verða tó ikki rokkin, uttan at ávísar fyritreytir fyri slíkari vinnu eru tilstaðar ella loknar.

Fyritreytirnar fyri privatari vinnu og menning av privatari vinnu kunnu vera mangar, men tær eru fremst ein kombinatión av møguleikum fyri samvinnu og samhandli (arbeiðsbýti) úteftir og stedligum viðurskiftum (tilfeingi á staðnum í víðastu merking). Hetta er niðurstøðan í at kalla øllum frágreiðingum, sum eru gjørdar í londum við marknaðarbúskapi.

Trupulleikarnir í løtuni í Føroyum fyri vinnuligum fyritakssemi eru óvanliga stórir og kunnu tí ikki fult samanberast við trupulleikarnar í øðrum londum. Vit eru komin inn í eina ónda ringrás. Hon verður bert brotin, um vit broyta nógv viðurskifti samstundis og serliga tey, sum hava størst týdning. Av pørtum, sum hava serligan týdning, eru at nevna




Kapital- og fíggingarviðurskiftini hjá føroyskum vinnufyritøkum, bæði saneraðum og ósaneraðum, hava síðan kreppan kom í verið so háttað, at bert fremmandakapitalur er í flestu fyritøkum. Hesin fremmandakapitalur er illa tryggjaður. Undir slíkum viðurskiftum fær leiðslan ikki virkað til frama fyri fyritøkuna. Høvuðsuppgávan hjá leiðsluni verður at hugsa um fremmandakapitalin og at tosa við kreditorar. Leiðslan hevur einki rásarúm at taka avgerðir, og øll ætlanarlegging gerst sera ótrygg. Hetta førir so aftur til, at kundarnir verða ótryggir, og keypa teir vøru frá fyritøkuni, verður prísurin bert í undantaksføri til fyrimunar fyri fyritøkuna. Fyritøkan gerst eisini ótrygt arbeiðspláss fyri arbeiðsfólkið, við teimum fylgjum hetta hevur fyri effektivitetin og møguleikan at varðveita og økja um førleika í virkseminum. Sostatt førir henda ónda ringrás til, at fremmandakapitalurin verður uppaftur verri tryggjaður.

## 1.2 Kann lið gerast í ringrásini?

Omanfyri eru bert í heilt stuttum greitt frá óndu ringrásini. Fær hon loyvi at halda á fram,

røkkur hon einaferð á botn. Komin á botn kann góð ringrás byrja, men á munandi lægri støði.

Landsstýrið og samfelagið vilja ikki góðtaka, at henda ónda ringrás sleppur á botn. Samfelagsligu og sosialu kostnaðirnir av hesum eru ovurstórir, og nógv virði fara fyri skeyti. Hin vegin kunnu sosialu og samfelagsligu kostnaðirnir og tapini gerast upp aftur verri, verður ikki rætt atborið í royndunum at bróta ringrásina.

**Arbeiðsbólkurin mælir til**, at í royndunum at bróta ringrásina mugu hugsast um fleiri tiltøk, sum eru partar av gjøgnumtonktari og avtalaðari heild og sum virka samstundis ella í greiðari og skilvísari røð.

Arbeiðsbólkurin hevur tí lagt dent á í hesi frágreiðing at lýsa kaptitalviðurskiftini og fíggingarviðurskiftini hjá føroyskum vinnulívi. Hetta er lyklaspurningurin, og fæst ikki ein broyting í hesum í einum samstarvi millum privata fyritakssemið, peningastovnarnar og hitt almenna, eru øll onnur tiltøk burturspilt. Broytingarnar, sum skulu henda á hesum øki fyrst, nýtast ikki vera stórar kollveltingar, men týdningarmiklar broytingar mugu henda. Tá broytingarnar eru hendar, er neyðugt at halda fast um tær, so grundarlag og álit ikki verða tikin undan teimum. Av somu orsøk hevur arbeiðsbólkurin havt tætt samskifti við peningastovnarnar.

Í eini byrjunartíð kann tað vera neyðugt at fíggja tað at effektiviteturin ikki er komin upp á tað høga støðið. Her kann almennur stuðul koma upp á tal í einari tillagingartíð. Meginreglan má tó vera, at tað ikki ber til at krevja skatt inn ella taka lán, ið skattgjaldarin skal svara fyri, og seta tiltøk í verk, sum tann, sum letur skattin, ikki torir at seta egnan pening í.

## 1.3 Kapitalviðurskifti/fíggjar- og fíggingarviðurskifti

Føroyskar fyritøkur eru at kalla allar insolventar - bæði tær saneraðu og tær, ið ikki eru saneraðar enn. Peningastovnarnir hava greitt frá, at fíggjar- og fíggingarviðurskiftini hjá verkætlanum og fyritøkum verða skipaði út frá avtalum um risikobýti millum eginognina og

fremmandaognina. Minni váðin verður mettur í einari fyritøku ella verkætlan, størri part av samlaða fíggingartørvinum er ein peningastovnur sinnaður at taka á seg. Hetta er grundarlagið hjá eginognini at leggja til rættis sítt virksemi.

Er fyritøkan insolvent, liggur allur váðin á fremmandafíggingini, uttan at henda kann seta tal á, hvussu stóran part av fíggingini virði er aftanfyri. Hvussu henda virðisáseting má fara fram, fekk Sjóvinnubankin eina grundskúling í í døgunum fram til 6. oktober 1992.

## 1.4 Eginogn

Uttan nóg stóra eginogn ber ikki til hjá fyritøkunum at fáa neyðuga fremmandafígging, og uttan møguleikar fyri at fáa fremmandafígging og bert klára seg við eginogn skal váðin í einari verkætlan vera sera lítil og møguleikarnir fyri at fáa vinning rættiliga vissur.
Flestu verkætlanir í Føroyum hava higartil bygt á stórar íløgur, har tað almenna hevur tryggjað, at hesar kundu fremjast við lítlum eginpeningi (Stuðulslánini sambært lóg um endurnýgging av skipaflotanum eru gott dømi). Hesar íløgur hava víst seg at hava lítið og einki virði, og eisini peningastovnarnir, sum hildu seg vera tryggar, hava mist pening.

Nýggjar verkætlanir nú krevja nógv størri eginpening, enn vinnan er von við; bæði tí at tey virði, ið kundu verið sett í veð, ikki hava tað virði í handli og vandli, ið tey eru útvegað fyri, og tí at verkætlanirnar krevja eina rakstrarfígging, ið fyri alra størsta partin má fíggjast av eginognini.

**Størsti trupulleikin fyri vinnuna og harvið fyri at útvega arbeiðspláss er sostatt neyðin at útvega vinnufyritøkum váðafúsan eginkapital.**

## 1.5 Tveir møguleikar at útvega meira váðafúsan eginkapital

Í arbeiðssetninginum er víst á ein møguleika at fáa váðafúsan eginkapital fram. Hetta er at veita skattligan frádrátt fyri pening, sum verður settur sum partapeningur í føroyskar fyritøkur. Hetta varð skotið upp av Føroya Arbeiðsgevarafelag í notati, dagfest 26. august 1992, og av Nevndini fyri arbeiðsskapandi tiltøk í uppskoti, dagfest 21. desember 1992. Í uppskotinum sigur nevndin, at skattligur frádráttur fyri partapening er eitt annars óvanligt og í roynd og veru óynskt tiltak, men at óvanlig tiltøk mugu verða tikin í verandi støðu, ið eisini er merkt av, at nøgdin av kapitali er lítil og í hvussu so er spjadd, og av at tað hevur verið óvanligt at seta váðafúsan kapital í nóg stórum nøgdum í fyritakssemi. Arbeiðsbólkurin hevur arbeitt víðari við hesum uppskoti. Í arbeiðssetninginum fær arbeiðsbólkurin til uppgávu

* at leggja fram uppskot um lóggávu,
  ið tryggjar, at hetta ikki verður ein nýggjur "skattafidusur",
  men ein skipan, sum kemur at menna vinnulívið á ein slíkan hátt, at tað kemur at loysa seg samfelagsliga, og

* at meta um, hvat skipanin fer at kosta í fyrsta umfari, og
  í hvønn mun og hvussu skjótt hon kann koma at svara seg aftur.

Arbeiðsbólkurin hevur eisini valt at lýsa møguleikarnar við einum framtaksfelagi gjøllari. Her er lógarverkið klárt og samtykt í løgtinginum. Samstundis er í báðum førum neyðugt at góðkenna tey partafeløg, loyvt er at seta partapening í. Trúliga verður góðkenningarmannagongdin viðvíkjandi partafeløgum, sum partapeningur við skattligum frádrátti kann verða settur í, ikki so kravmikil, sum mannagongdin, tá framtaksfelag skal góðkenna partafelag, áðrenn tað setir partapening í.

### 1.5.a Skattligur frádráttur fyri partapening

Frammanfyrinevndi arbeiðssetningur er rættiliga krevjandi. Øðrumegin skal arbeiðsbólkurin koma við lógaruppskoti um eina skipan, i veruliga mennir vinnulívið, uttan at skipanin gerst

ein "nýggjur" skattafidusur, og arbeiðsbólkurin skal meta um, hvat skipanin fer at kosta, og um og hvussu skjótt, tað, ið landskassin missir við skipanini, kemur aftur í landskassan. Aftarat hesum hevur arbeiðsbólkurin lagt dent á, at skipanin skal vera møgulig at umsita.

Arbeiðsbólkurin hevur tí ráðført seg gjølla við fíggjar- og peningastovnarnar, ríkisviðurkendu grannskoðararnar og vinnuna, og hevur lagt fyri hesar partar fleiri uppskot um skipanir. Allir partar óttast møguliga misnýtslu av einari slíkari skipan, ella at hon í ov stóran mun verður ein skattafidusur hjá nøkrum fáum. Í tann mun hædd verður roynt tikin fyri hesum, gerast krøvini og eftirlitið so víttfevnandi og fløkt, at skipanin valla kann umsitast á tryggan hátt. Royndir at gera skipanina einfalda at umsita, eitt nú við at lata hana vera galdandi fyri innskotspening heldur enn fyri partapening, føra til, at veruliga endamálið, nevniliga at styrkja váðafúsa og ábyrgdarkenda kapitalgrundarlagið í vinnuni, ikki verður rokkið.

Vinnan hevur verið rættiliga ivasom um tey uppskot, ið arbeiðsbólkurin hevur lagt fram, tí tað tykist næstan ikki gjørligt at evna uppskot til, ið ikki skeikla bygnaðin í vinnuni uttan at tað kann sigast, at broytti bygnaðurin verður betri, ella vinnan mentari.

Skal eitt slíkt lógaruppskot samtykkjast, verður neyðugt at landsstýrið og løgtingið gera sær greitt, at tað ikki slepst undan ávísari misnýtslu. Skattatrýstið í Føroyum er so stórt, at um persónur yvirhøvur hevur avlopspening eftir skatt, kann hann ikki verða annað enn freistaður til at gera eina íløgu, har landskassin rindar 70 kr. fyri hvørjar 30 kr., hann sjálvur rindar.

Arbeiðsbólkurin hevur ikki havt umstøður at kanna íslendsku skipanina nóg gjølla. Skipanin har krevur, at partafelagið skal hava minst 12 mió. ísl. kr. í partapeningi, og talið á partaeigarum má ikki vera minni enn 25. Harumframt skulu ongar avmarkingar vera í sølu av partabrøvum, og roknskapurin skal verða almennur. Íslendska skipanin er sostatt einans galdandi fyri tær heilt stóru fyritøkurnar. Hetta saman við kravda minstatalinum á partaeigarum og munandi lægra skattatrýstinum har ger, at møguleikarnir fyri, at hetta er ein skattafidus, ikki eru so stórir har. Arbeiðsbólkurin hevur ikki mett, at politiski meirilutin í Føroyum ynskir serliga fyrimunir fyri stórar fyritøkur, sonevnd lokomotiv, og í vinnuni er lítil hugur fyri at styrkja slíkar fyritøkur framum aðrar.

Arbeiðsbólkurin leggur tískil · tvey uppskot fram. Annað uppskotið er hann av frammanfyrinevndu og øðrum orsøkum ikki er serliga fegin um. Arbeiðsbólkurin heldur tó uppskotið verða tað, ið frægast lýkur ymisku áhugamálini í arbeiðssetninginum. Hitt uppskotið líkist íslendsku skipanini meira.

Men arbeiðsbólkurin heldur tað ikki verða gjørligt at meta um, hvat skipanin fer at kosta í fyrsta umfari, og í hvønn mun og hvussu skjótt hon kann koma at svara seg aftur. Sum frammanfyrinevnt eru kapitalviðurskiftini størsta forðingin fyri, at vinnulig framgongd kann henda, og at fyritøkurnar kunnu verða riknar á rættan hátt. Men hetta er sum eisini nevnt langt frá einasta treyt. Tað velst tí um hini tiltøkini, ið tað er neyðugt at fremja, og hvussu skjótt tey verða framd.

Arbeiðsbólkurin hevur fingið upplýst, at í Íslandi tók tað 5 ár, áðrenn dik kom á tekning av partapeningi, og meta vit út frá hesum um nýtsluna í Føroyum, heldur arbeiðsbólkurin, at mest sannlíkt fer skattafrádráttur fyrstu tvey árini ikki at verða hægri enn einar 10 mió. kr. Tað fer at taka tíð hjá vinnulívinum at venja seg við møguleikan og hvørjar treytir, skipanin setir. Herumframt skal hon fyrireikast, og skattaborgarin skal hóast alt meta um, um hetta virkið og henda ætlanin er verd hjá honum at seta pening í. Tó at skattligu fyrimunirnir eru eyðsæddir, vilja teir vera mest eyðsæddir hjá spekulantunum. Vanligi skattaborgarin, ið stendur fyri ógvusligu afturgongdini í innflutninginum, fer ikki í bræði at seta partapening í vinnufyritøkur, uttan hann samstundis tryggjar sær aðrar fyrimunir, eitt nú arbeiði, sølu o.t. Tað velst tí um, hvussu langt verandi partaeigarar í fyritøkum eru komnir í teirra fatan av týdninginum av at økja um kapitalgrundarlagi og teirra ætlanum, hvat skipanin fer at kosta í fyrsta umfari. Longri fyritøkurnar eru komnar, størri verður ávirkanin á landskassan, men arbeiðsbólkurin heldur eisini, at tá eru útlitini eisini størri fyri, at peningurin kemur skjótari aftur.

Arbeiðsbólkurin ynskir til endans at gera vart við, at hann óttast ta ávirkan, slík skipan, sum frá líður, fær fyri hugin at seta váðafúsan kapital í fyritøkur og á samstarvið millum fyritøkur og peningastovnar um avtalað býti av váða. Hesin "skattafrádráttar"kapitalur fær møguliga heldur ikki somu virðing, sum kapitalur settur í við tí endamáli at fáa avkast.

**Arbeiðsbólkurin hevur** tikið íslendsku fyrimyndina til sín, at tað ræður um at fáa eina fjøld av fólki at seta partapening í hvørt partafelag, fyri at skattligur frádráttur kann verða góðkendur, men í hjálagda lógaruppskoti er talið tó avmarkað til 10, har íslendska lógin sum nevnt krevur 25. Herumframt verður kravt, at í minsta lagi 3 partaeigarar eiga hvør sær týðandi part av parta-peninginum.

**Arbeiðsbólkurin hevur** heldur ikki mett tað rætt at avmarka skattafrælsi til partapening í framleiðslufyritøkur. Alt bendir á, at tað er tænastuparturin, eisini hjá framleiðslufyritøkum, ið fær týdning fyri kappingarførið í framtíðini. Tí hevur arbeiðsbólkurin valt ta avmarking, at partafeløgini mugu hava minni enn 20 % av sínari inntøku frá útleigu, uppsiting og umsiting av fastari ogn og av inntøku av kapitalplassering.

Í lógaruppskotinum er skotið upp, at heimildin higartil fyri skattligum frádrátti fyri effektiv veðhald verður strikað. Henda regla skal fáa gildi frá sama degi, lógaruppskotið verður lagt fyri løgtingið. Herumframt verður skotið upp, at landsstýrið umhugsar, at verandi veðhaldsskyldur kunnu verða innloystar við partapeningi við skattafrádrátti. Í slíkum førum kann partapeningur verða upp til 300.000 kr. Arbeiðsbólkurin heldur tað vera av stórum týdningi at fáa lúkað skattligan frádrátt fyri effektiv veðhald út úr skattalógini skjótast til ber.

## 1.5.b Framtaksfelag/feløg

Arbeiðsbólkurin hevur lagt stóran dent á at tala við peningastovnarnar um møguleikarnar at fáa sett eitt framtaksfelag á stovn, møguliga við lokalum tilknýti. Neyðugt er, at eitt tílíkt framtaksfelag hevur serkøna leiðslu at samstarva við fleiri serkøn fakøki. Serkøna leiðslan kann ikki veljast út frá politiskum ynskjum um skjót úrslit, men út frá ynskjum um at tryggja partapeningin í framtaksfelagnum, so hann verður eins væl forrentaður sum frá líður, sum var peningurin settur í eitt nú virðisbrøv. Fyritøkur, ið hava góða leiðslu og virkisætlan, kunnu gjøgnum fakligu samráðingarnar við framtaksfelagið fáa hjálp til at fremja røttu saneringina, og harvið leggja støðið fyri at fáa nýggjan váðafúsan kapital umframt fáa ískoytiseginfígging frá framtaksfelagnum. Stedligi áhugin fyri einari fyritøku kann verða stuðlaður við tilboði um annaðhvørt at seta partapening í fyritøkuna ella seta partapening í

framtaksfelagið, sum aftur setir teir í felagið.

Kravið um forrentning fer at bera við sær, at tað fara at vera nýggjar vinnur og nýggjar ætlanir, ið meginparturin av íløgunum hjá framtaksfelagnum fara í.

Á fundi við peningastovnarnar hevur Norðoya Sparikassi víst á, at hann á ein hátt longu hevur sett pening í eitt framtaksfelag fyri Norðuroyggjar. Tað skilst, at hinir peningastovnarnir ikki meta hesa roynd lætta og kanska heldur ikki rætta at taka eftir. Arbeiðsbólkurin skilir, at Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Norðoya Sparikassi hava tikið upp eitt rættiliga óvanligt samstarv við at veita meginpartin av váðafúsa partapeninginum í P/F Kósin, har privatkapitaláhugamálini verða røkt av einum minniluta í partafelagnum, og hesin seinni hevur rættiliga fríar hendur at virka fyri kapitaláhugamálunum. Norðoya Sparikassi hevur mett tað neyðugt fyri Sparikassan at fáa virksemið í økinum í gongd aftur, tí annars kundi framhaldandi arbeiðsloysi ført til húsagang hjá fleiri húskjum, ið hava sethúsalán í Sparikassanum. Men Norðoya Sparikassi legði eisini áherðslu á týdningin av at avmarka luttøkuna hjá einum peningastovni.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt royndina hjá Norðoya Sparikassa gjølla við peningastovnarnar fyri at fáa fram, hvørji tey størstu vandamálini eru við einari slíkari loysn, og hvat kann tala fyri og vera fortreytin fyri, at hinir báðir peningastovnarnir vilja royna eina slíka loysn. Hetta er gjørt, tí hesir spurningar eru av størsta týdningi fyri, hvussu eitt framtaksfelag annars kann koma at hepnast.

Úrslitið av hesari umrøðu er, at stóru peningastovnarnir, t.e. Føroya Banki og Føroya Sparikassi, hava boðað frá, at teir heldur vilja luttaka í einum framtaksfelag/íløgufelag enn royna loysnina hjá Norðoya Sparikassa, og at teir meta møguleikarnar í einum slíkum framtaksfelag eyðsýndar, um umsitingin av tí samstundis kann taka sær av umsiting av ábyrgdargrunninum og av viðgerð og umsiting av teimum stuðulsskipanum, grunnum v.m., ið løgtingið/landsstýrið hava ella fara at seta í verk til frama fyri føroyskar vinnulívsfyritøkur.

**Arbeiðsbólkurin ræður tí** landsstýrinum til at leggja alla orku í at fáa framtaksfelagið sett

á stovn skjótast gjørligt við so breiðari undirtøku sum gjørligt. Tað nýtist ikki at vera so stórt økið sum nýstovnaða grønlendska við 60 mió. kr. í partapeningi fyri kortini at kunna gera mun.

(Semjan á Kristiansborg 17. november 1994 um stovnan av vinnufremjandi grunni við 200 mió. kr. í eginpeningi kann tykjast at taka grundarlagið undan einum framtaksfelag, sum lógargrundarlag og játtan er til, og sum arbeiðsbólkurin ræður til at fáa stovnsett. Arbeiðsbólkurin heldur kortini, at framtaksfelagið eigur at verða stovnað; breiða luttøkan og nevndarsamansetingin í felagnum ger, at tað í nøkrum førum kann fremja ígongdsetan skjótari enn stóri vinnufremjandi grunnurin, ið fremst fær almenn umboð í nevndina, og fer at fáa serligar bindingar, ið lítli grunnurin ikki nýtist at hava.)

## 1.6 Fremmandafíggingin

Frammanfyri er umrøtt, hví stóri trupulleikin ikki er tvørrandi fremmandafígging til føroyskar fyritøkur. Í alraflestu fyritøkunum er samlaða fremmandafíggingin munandi størri enn virðið á fyritøkunum. Her er ikki gjørligt at tala um avtalu millum eginogn og fremmandafígging um risikobýti. Einasti vegur hjá hesum fyritøkum er ein sanering, so fremmandafíggingin verður niðurskrivað so langt, at váðafúsur eginkapitalur hevur hug at koma inn í fyritøkuna.

Arbeiðsbólkurin hevur eisini umrøtt hesar trupulleikar við peningastovnarnar. Undir hesum samrøðum hava spurningarnir um útvegan av almennum íkasti av fremmandafígg-ing eisini verið umrøddir. Talað hevur verið um, at eitt nú íleggingargrunnurin kann koma við einum slíkum íkasti av fremmandafígging, um peningastovnarnir av likviditets- ella soliditetsorsøkum ikki makta uppgávuna. Arbeiðsbólkurin og peningastovnarnir eru á einum máli um, at bert har peningastovnarnir hava soliditets- ella likviditetstrupulleikar, kann tað yvirhøvur koma upp á tal, at eitt nú íleggingargrunnurin kemur inn í myndina. Hetta vil so trúliga vera, har verkætlanirnar eru sera stórar, og tá er kanska enn størri orsøk hjá íleggingargrunninum at vísa afturhaldni, tí sjálvt um váðin ikki verður mettur stórur, so kann eitt møguligt tap verða so mikið tyngri at bera, skuldi tað óvæntaða - ið sjálvsagt alt og ofta

hendir - hent.

**Arbeiðsbólkurin ræður til,** at íleggingargrunnurin heldur verður nýttur til fíggingar av stórum íløgum av infrastrukturellum slagi sum higartil; men frameftir í størri mun av tí infrastrukturi, ið er neyðugur fyri at tryggja flutning, samskifti og samferðslu við tann útheim, ið er okkara marknaður, og sum kann tryggja framburðin í Føroyum upp á marknaðartreytir.

(Semjan á Kristiansborg 17. november 1994 um at nýta 100 mió. kr. av ogn íleggingargrunsins til helvt av grunsfænum hjá stóra vinnufremjandi grunninum fer vónandi ikki at forða gunninum at læna pening til frammanfyri nevndu stóru - og sera neyðugu - íløgurnar av infrastrukturellum slagi til tryggjan av okkara flutningsleiðum, samskifti og samferðslu við útheimin.)

Annar møguleiki, ið hevur verið nevndur, er at fáa ábyrgdargrunnin at virka. Tann spurningur hevur verið reistur, um upphæddin, ið ábyrgdargrunnurin kann borga fyri, ikki eigur at vera munandi hægri enn tær 500.000 kr. Arbeiðsbólkurin ræður frá at hækka hesa borganarupphædd ov nógv. Fyri tað fyrsta snýr tað seg kanska meira um at fáa fleiri smáar verkætlanir í gongd og harvið minka um tapsvandan. Fyri tað næsta má ábyrgdargrunnurin bert vera til eykatrygd hjá peningastovnum fyri tann lánspening, ið er tryggjaður innan fyri 50 - 70 % av pantivirðinum í virkinum, og hvørki fyri tey fyrstu 50 %'ini ella - og avgjørt ikki - fyri lán, ið koma í staðin fyri eginogn. Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt ábyrgdargrunnin við fyribils útnevnda stýrið fyri ábyrgdargrunnin, tí mangir óloystir ivaspurningar eru um virkan grunsins í lógartekstinum, og serliga tá tað snýr seg um at taka avgerð um, hvørjar verkætlanir eru nýggjar, hvørjar framleiðslur eru nýggjar v.m., og um eitt slíkt býti millum nýggjar og "eldri" verkætlanir og framleiðslur í øllum viðurskiftum er heppið. Spurningurin hevur týdning í sambandi við uppskotið um skattaendurgjald fyri nýggjar vinnur, sí seinni.

Royndirnar við ábyrgdargrunninum í Danmark, sonevnda InitiativKaution, hava higartil ikki verið positivar, tí skipanin hevur verið lítið brúkt. Donsku peningastovnarnir gjørdu greitt frá byrjan, at líka lítið, sum teir ynsktu at missa 100 %, ynsktu teir at missa 50%. Viðurskiftini í Danmark og umstøðurnar har eru ikki sum her.

**Arbeiðsbólkurin heldur** tí, at nú lóg er komin um ábyrgdargrunn, eigur hann at verða royndur í Føroyum, og at hann eigur í serligan mun at vera ætlaður til nýggjar vinnur, nýggjar framleiðslur og nýggj tiltøk, ið byrja í smáum.

## 1.7 Leiðsla og marknaður

Tá grundleggjandi kapitaltørvurin hjá fyritøkunum er nøktaður, t.e. váðafúsi kapitalurin og fremmandafíggingin, veksur tørvurin á fígging av langsiktaðum tiltøkum í fyritøkunum og av "fløgum" í eitt nú vitan, førleika, innlit og tillaging til framtíðar krøv og møguleikar, herundir ISO 9000 góðkenda góðskustýring. Fyritøkurnar hava tørv á, og peningastovnarnir hava áhuga í, at hesi langsiktaðu tiltøk og "fløgur" verða gjørd, samstundis sum og í framhaldi av tí endurreisn og nýstovnan av fyritøkum, ið lagt verður upp til í samstarvinum um at útvega fyritøkunum neyðuga váðafúsu eginognina. Fyritøkurnar makta ikki fíggjarliga hesi tiltøk og "fløgur", ið vanliga vildu verið goldin av eginognini, eitt nú avlopinum. Og peningastovnarnir kunnu ikki hjálpa til her. Samstundis er greitt, at júst slík tiltøk og "fløgur" vilja geva vinnulívinum sum heild og arbeiðsmegini eitt dygt "kompetansu-lyft", ið hevur nógv at týða beinanvegin, men serliga frameftir. Sjálvt um føroyski landskassin ikki er kappingarførur við útlendskar landskassar, so er almennur stuðul til slík tiltøk og "fløgur" loyvdur í altjóða samvinnu - enn.

Landsstýrið og løgtingið hava, longu sum er, stuðulsgrunnar, ið kunnu veita slíkum langsiktaðum tiltøkum og "fløgum" fíggjarligan styrk. Hugsað verður m.a. um grunnin til ídnaðarfremjandi endamál og lógina um menning av fiskivinnu á landi.

**Men arbeiðsbólkurin heldur**, at hesir stuðulsgrunnar mugu radikalt umleggjast og samskipast, um nøkur nytta skal fáast úr teimum, ið tænir felags áhugamálunum hjá tí almenna, hjá fyritøkunum og hjá peningastovnunum um fleiri og trygg arbeiðspláss. Eitt nú eiga stuðulsgrunnarnir at fáa størri og tryggari fíggjarliga orku, og herumframt má umsitingin av grunnunum leggjast burtur frá politiskari og politisk/umsitingarligari viðgerð, ið m.a. ber í sær, at ætlað kappingarfremjandi tiltøk hjá fyritøkunum verða kend av kappingarneytunum,

áðrenn tey eru sett í verk.

Hetta kann gerast við, at greiðir málsetningar verða lagdir fyri virkan grunnana, og her heldur arbeiðsbólkurin, at fyriliggjandi reglugerð fyri grunnin til ídnaðarfremjandi endamál og kunngerð um menning av fiskivinnuni á landi eru væl hóskiligar at ganga út frá.

**Arbeiðsbólkurin heldur ikki**, at tað er avgjørt neyðugt at samskipa stuðulsgrunnarnar í **ein** stuðulsgrunn, uttan so at trupult er at játta neyðugu upphæddirnar á fíggjarlógini, men arbeiðsbólkurin heldur, at nevndu stuðulsgrunnar og aðrir, ið tørvur kann vera á til vinnur, ið krevja serligan stuðul, í størstan mun eiga at verða umsitnir av somu ekspertisu, ið eigur at fáa álagt at koma við uppskotum um broytingar, so stuðulsgrunnarnir støðugt kunnu stuðla best møguliga undir framtíðar menning av vinnum og fyritøkum.

Ein slík ekspertisa kundi verið bygd upp rundanum framtaksfelagið ella betur ein nýggjan fíggingarstovn til frama fyri ídnað, handverk og tænastuvirksemi. Vandan, at stuðul verður latin til fyritøkur, ið framtaksfelagið hevur sett partapening í, ella fíggingarstovnurin hevur latið lán til, heldur arbeiðsbólkurin tað vera neyðugt at liva við. Hesin vandi kann eisini avmarkast við eftirliti.

Fyrsta stig má tó vera at tryggja grunnunum neyðuga peningaorku at arbeiða við í næstu framtíð. Arbeiðsbólkurin ræður tí landsstýrinum til á eykafíggjarlógini fyri 1994 at

**hækka** játtanina fyri grunnin til ídnaðarfremjandi endamál við 23 mió. kr., harav 6 mió. kr. eru til sjálvan grunnin, 2 mió. kr verða settar til at gjalda umsiting í 1995 av framtaksfelag v.m. ella serligu nevndina, sbr. seinni, meðan 15 mió. kr. verða settar at standa ímóti virkanini av skattafrádrátti fyri partapening, og at

**seta** í framtaksfelagsgrunn avsettu 9 mió. kr.

## 1.8 Skattaendurgjald fyri nýggjar vinnur

Arbeiðsbólkurin fatar ikki uppskotið um skattaendurgjald fyri nýggjar vinnur sum skattligt lógarmál. Heldur er tað ein stuðulsskipan til nýggjar vinnur, ið tekniskt kann verða umsitin sum FAS-skipanin, t.e. gjøgnum samtíðarskattaskipanina. Eins og FAS-skipanin kann ein slík stuðulsskipan verða sera einføld at umsita tekniskt, tá tað ræður um heilt nýggj arbeiðspláss í heilt nýggjum vinnum í fyritøkum, ið einki annað takast við. Og arbeiðsbólkurin heldur, at í tílíkum førum ber til at meta um, hvørja ávirkan ein slík stuðulsskip-an kann fáa á skattainntøkur landsins.

Truplari verður skipanin at umsita, tá fyritøkan tekur upp nýtt virksemi afturat verandi virksemi, og trupult verður at tryggja mótvegis øðrum fyritøkum, at kappingaravlagandi studningur ikki verður givin til sama virksemi sum teirra. Neyðugt er tí við sera greiðum og strongum krøvum, tí skipanin kann bert virka, um skattaendurgjaldi kann verða útgoldið loypandi.

Arbeiðsbólkurin hevur fingið upplýst, at vinnan er rættiliga misjøvn á máli um slíka FAS-skipan, tí umframt óttan um møguligan kappingaravlagandi stuðul óttast vinnan, at ein slík skipan kann bera í sær lønglíðing og harvið gera tað enn truplari hjá verandi vinnufyritøk-um at varðveita arbeiðsplássini.

Arbeiðsbólkurin kann ivast í, hvørja hugsan danska stjórnin vil hava um skattligan frádrátt fyri nýggjar vinnur. Trúliga fer stjórnin at seta hana upp ímóti reglunum í EU um stuðul, har loyvdur stuðul tykist avmarkaður til smáar fyritøkur. Teir kunnu vísa á, at vit hava ábyrgdargrunnin, sum lættir um váðan hjá peningastovnum at læna til nýggjar fyritøkur, og teir kunnu vísa á, at arbeiðsloysisskipanin í eitt tríggjar mánaða skeið letur nýggjum arbeiðsplássum, ið ikki eru í kapping við verandi arbeiðspláss, 25 kr. í studningi um tíman hjá einum arbeiðsleysum, ið fær arbeiði.

Peningastovnarnir hava somuleiðis verið misjavnir á máli um eina slíka skipan. Í fyrsta lagi óttast teir eina nýggja stuðulsvinnu, og í øðrum lagi eru teir ivasamir um møguleikan at "kapitalisera" stuðulin sum part av avtalu millum fyritøkuna og peningastovnin um býti av

váða. Ikki er óhugsandi, at illviljin er íborin ella instinktivur, tí skipanin verður eitt nýtt element, ið bert er galdandi fyri ein lítlan part av vinnuni, og óvissa kann vera um psykologisku ávirkanina á teirra kundar, og hvussu leingi hon kann virka. Talan kann eisini vera um íbornan iva um, hvussu reglur um góðkenning av nýggjum vinnum yvirhøvur kunnu verða umsitnar á ein slíkan hátt, at tað kenst rættvíst, tá skattaendurgjald verður játtað.

**Arbeiðsbólkurin er tó samdur** við landsstýrið í, at neyðugt er at fáa sett nýggjar vinnur á stovn í Føroyum, og at tað ræður eins nógv um at stuðla einari gongd fram ímóti nýggjum vinnum, sum at lætta um hjá verandi vinnum. Einasta tilfeingi, ið enn er langt frá at vera fullnýtt, er føroyska arbeiðsmegin, og møguleikar at nýta hana tykjast einans vera í nýggjum vinnum.

**Arbeiðsbólkurin** hevur tikið frammanfyrinevndu ivaspurningar við í sínum uppskoti um lógarreglur og **skjýtur** upp,

**at** skattaendurgjald fyri nýggjar vinnur einans kann verða latið, um nýggja vinnan er útflutningsfremjandi, og ikki er í kapping við verandi vinnu um marknað ella rávøru,

**at** skattaendurgjald fyri nýggjar vinnur kann verða latið í mesta lagi fyri trý - fýra ár og einans, um góðkenda virksemið fer fram á slíkan hátt og undir so skipaðum viðurskiftum, at løggildur grannskoðari kann vátta endurgjald so hvørt og við sama títtleika sum undir FAS-skipanini, og

**at** nevndin (umsitingin) av framtaksfelagnum er góðkennandi stovnur av nýggjum vinnum/virksemi, og at avgerð um, at talan ikki er um nýggja vinnu/virksemi ikki kann verða skotin inn fyri annan stovn.

# Ítøkilig uppskot

# 2. Skattafrádráttur fyri partapening

Ætlanin er, í ein ávísan mun, at veita skattafrádrátt fyri keyp av partabrøvum.

Málið við hesum tiltaki er at eggja borgarum til at seta partapening í solvent partafeløg og harvið bøta um konsolideringina hjá hesum feløgum og soleiðis skapa grundarlag fyri øktum virksemi.

## 2.1 Generelt um tílíkan frádrátt

### 2.1.a Neutralitetur

Ein av teimum skattligu meginreglunum er neutralitetur, og ein kann siga, at ein skattaskipan er neutral, tá hon ikki ávirkar, hvussu skattaborgararnir leggja sítt búskaparliga virksemi til rættis. Her verður serliga hugsað um:

* val av íløgum
* val av eigara / felagsviðurskiftum
* val av fígging
* val av framleiðslu

### 2.1.b Nýtsla av skattaskipanini

Hóast omanfyrinevndu meginreglu hava skattaskipanirnar í stóran mun verið nýttar sum búskaparligt stýriamboð. Hetta hevur bæði verið galdandi hjá okkum og hjá grannalondum okkara.

### 2.1.c Fyrimunir og vansar við at nýta skattaskipanina í búskaparstýringini

Ein orsøk til at skattaskipanin ofta verður nýtt í tílíkum førum, er, at tiltøkini krevja

lutfalsliga lítla umsiting.

Ein vansi er, at ikki kann síggjast, hvat tiltøkini, ið vanliga eru ein ella annar stuðul til vinnuna, kosta.

Ein annar vansi er, at tílíkar skipanir ofta blíva verandi í gildi eisini eftir at málini, ið náast skuldu eru nádd. Í Føroyum kenna vit jú dømini rentuskattaskipanin og frádráttarrætturin fyri kautiónstap og tap av lánum til vinnuvirki.

## 2.1.d Partabrævafrádráttur mótvegis øðrum frádrátti

Skattligur frádráttur fyri keyp av partabrøvum hevur ikki verið givin áður í Føroyum, og heldur ikki í grannalondum okkara tó undantikið Íslandi, har tílíkur frádráttur hevur verið galdandi síðani 1984 og er nógv nýttur í dag.

Avskrivingarlógin er tað amboð í vanligast hevur verið nýtt til at lokka pening uttanífrá inn í vinnuna. Hetta hevur vanliga verið gjørt undir ymiskum konstruktiónum sum t.d. komanditfeløg, partsreiðaríir, íognarfeløg. Felags fyri tílíkar konstruktiónir er, at teir persónar, ið seta í feløgini, koma at eiga ein lutfalsligan part í hvørjum einstøkum aktivi, og kunnu sostatt avskriva bæði uppá tann partin, sum er fremmandfíggjaður, og uppá tann partin, sum er eginfíggjaður, og í mongum førum hevur eginfíggingin verið sera lítil. Hetta hevur í mongum førum merkt, at íløgur hava verið gjørdar einans av skattligum grundum.

Sami møguleiki er ikki til staðar, tá talan er um partafeløg. Tá frádráttur verður givin fyri keyp av partabrøvum ella kanska bert fyri part av keyptum partabrøvum, skulu aðrar ætlanir enn skattasparing eisini vera við keypinum.

Einki er at ivast í, at ein tílík skipan kemur at verða brúkt og økja konsolideringina í vinnuni, men ógjørligt er at siga, hvussu nógv. Skattligu incitamentini eru ikki so sterk sum í omanfyrinevndu feløgum, men innskjótarar hava tann fyrimun, at teir frammanundan kenna risikoina, og at hon er avmarkað til partapeningin.

### 2.1.e Fígging

Ikki ber til at siga, hvussu nógv ein tílík skipan kemur at kosta almenna kassanum, og tí hevði helst verið rættast at sett eitt loft fyri samlaða árliga frádráttinum.

## 2.2 Umsitingarligir spurningar

Umsitingarligu spurningarnir kunnu býtast í tveir høvuðsbólkar.

* Staðfesting av, hvørji feløg frádráttur skal galda fyri

* Trygging av peninginum í feløgunum

### 2.2.a Staðfesting av, hvørji feløg frádráttur skal galda fyri

Upprunaliga var ætlað, at frádrátturin skuldi avmarkast til partapening í feløgum innan fiskivinnu, aling, framleiðslu, ferðavinnu og flutningsvinnu.

Ein tílík avmarking hevði verið búskaparliga avlagandi og hevði skapt umsitingarligar trupulleikar. Mælt verður tí til, at skipanin skal galda fyri partapening í føroyskum partafeløgum uttan mun til, hvørja vinnu, feløgini reka. Á henda hátt kunnu objektivu kriteriini í partafelagslógini og roknskaparlógini nýtast.

Ein avlaging er tó í omanfyri nevndu avmarking. Partafeløg fáa ein fyrimun fram um smápartafeløg. Eisini fáa partafeløg við fleiri partaeigarum fyrimun fram um partafeløg við fáau partaeigarum. Roknast má tó við, at ein víðkan av skipanini til at umfata øll partafeløg og smápartafeløg hevði kostað almenna kassanum nógv.

## 2.2.b Trygging av peninginum í feløgunum

Umráðandi er at tryggja sær, at tann peningur, ið frádráttur verður veittur fyri, veruliga umboðar konsolidering av felagnum:

* Ansast má eftir, at peningur ikki fyrst verður tikin úr felagnum fyri síðan at verða settur inn aftur.

* eisini má ansast eftir, at peningurin ikki kann takast útaftur ov skjótt, eftir at hann er innskotin.

Hugsast kunnu tríggir hættir at taka pening úr einum partafelagi:

1. **Hækking av løn ella tantiemu**
   Skuldi hesin háttur verið nýttur at útvega pening til partabrævakeyp, hevði skattafrádrátturin verið mótsvaraður av eini tilsvarandi lønarinntøku. Einasta veruliga broytingin hevði verið, at fríur eginpeningur hevði verið konverteraður til partapening.

2. **Úttøka av millumrokning**
   Sambært nýggju partafelagslóggávuni eru partaeigaralán ikki loyvd. Hinvegin er møguligt at taka pening út av eini millumrokning, ið stendur í kredit. Hetta merkir, at til ber at fáa frádrátt fyri at konvertera eitt lán ella kreditt, ið ein partaeigari eigur, til partapening.

3. **Vinningsbýti**
   Um ikki bygt verður upp fyri hesum, ber til fyrst at taka pening út sum vinningsbýti og síðani fáa frádrátt fyri sama pening í samband við keyp av partabrøvum. Eisini í hesum føri er talan um konvertering av fríum eginpeningi til partapening. Hetta merkir tó, at latenti skatturin á konverteraða fría eginpeninginum fellur til gjaldingar (35% vinningsbýtisskattur).

## 2.3 Krøv í partafelagslógini um hækking av partapeningi

Nýggja partafelagslógin ásetur, at tey partafeløg, ið framyvir eisini skulu verða partafeløg, skulu innan 1997 hava hækkað partapeningin til 500.000 krónur.

Ein regla um skattligan frádráttarrætt kemur óiva at gera hesa uppgávu møguliga hjá nøkrum feløgum, ið annars ikki høvdu megnað uppgávuna.

Mótsett má ein eisini rokna við, at nøkur feløg koma at fáa frádrátt fyri eina hækking av partapeninginum, ið tey kortini høvdu gjørt.

## 2.4 Kautiónstap og tap stavandi frá láni til vinnuvirki

Mælt verður til, at omanfyri nevndu reglur, ið eru ásettar í skattalógini § 33 nr. 2, samstundis verða tiknar av.

## 2.5 Lógaruppskot

Lógarreglurnar fyri einum partabrævafrádrátti kunnu gerast í løgtingslóg nr. 86 frá 1. sept. 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum.

Reglurnar kunnu t.d. setast sum nýggj grein 33 nr. 14.

Í parti 2.5.a er skitsa til lógarásetingar

## 2.5.a Skitsa til lógarásetingar

1. Peningur, sum fysiskir persónar í árinum gjalda inn sum partapening í føroyskum partafeløgum, kann dragast frá, tá skattskylduga inntøkan verður gjørd upp.

   Frádrátturin er eisini treytaður av, at felagið er skrásett.

   Verður felagið skrásett árið eftir, at peningurin er inngoldin, skal frádráttur gerast tað árið, felagið er skrásett.

2. Frádrátturin er treytaður av, at partapeningurin eftir hækkingina er í minsta lagi 1 mió. kr.

3. Frádráttarrætturin í skattaárinum hjá einstøkum skattgjaldara eftir hesi skipan er í mesta lagi 50.000 kr. Samlaði frádráttarrætturin hjá partaeigarum í einum partafelagi er avmarkaður til 50% av útveganarvirðinum av støðisfæi, útvegað seinastu 3 árini.

4. Frádrátturin fyri verandi feløg er treytaður av, at roknskapur fyriliggur fyri undanfarin ár. Eisini skal roknskapur fyriliggja, ið endar í ella fellur saman við kalendaraárinum 1994, ið er grannskoðaður av løggildum ella skrásettum grannskoðara, og av at felagið ikki hevur mist meira enn helvtina av verandi partapeningi.

5. Samlaða kapitalinnskotið skal vera somikið, at eginognin hjá verandi partafeløgum verður í minsta lagi 20%, og hjá nýggjum partafeløgum, í minsta lagi 30% av samlaðu skuldini. Verandi feløg, sum skulu byrja nýtt virksemi, verða í hesum sambandi roknað sum nýggj feløg. Er talan bert um lutvíst nýtt virksemi, kann minsta kravið ásetast millum 20 og 30%.

6. Frádráttur er treytaður av, at tað í partafelagnum eru minst 25 partaeigarar, ið tekna í minsta lagi 10.000 kr. í part.

7. Ikki er loyvt at draga frá partapening í feløgum, har hjúnafelagi, sambúgvandi, børn ella foreldur eru høvuðspartaeigarar.

8. Hevur ein persónur í árinum, tá drigið verður frá, ella í øðrum ella báðum av undanfarnu tveimum árunum, fingið útlutað vinningsbýti, herundir øll útlutan í samband við avtøku av felagi, skal henda útlutan dragast frá í møguligari partabrævanýtekning, áðrenn hon kann dragast frá á sjálvuppgávuni.

   Fáa persónar, ið hava drigið partapening frá eftir hesari reglu, vinningsbýti eitt ella fleiri av komandi 4 árunum, frá viðkomandi felagi, skal tann parturin av vinningsbýtinum, ið er størri enn 10%, skattast sum vanlig inntøka.

9. Frádráttarrætturin verður eisini treytaður av at felagið ikki økir um eginpartabrøv komandi 2 árini.

10. Selur ein partaeigari partabrøv, ið hann hevur drigið frá skattliga, innan 6 ár, skal hann intøkuføra ta upphædd, ið frádrigin varð.

11. Fyri hvørt fíggjarár verður sett eitt loft fyri partapening við skattafrádráttarrætti. Fyri 1995 verður loftið 75 mió kr.

    Komandi árini, sum hesar reglur eru í gildi, verður nevnda loft ásett í kunngerð av Føroya landsstýri.

12. Skráseting Føroya váttar, at omanfyri nevndu treytir verða hildnar, og boðar Toll- og Skattstovu Føroya frá, hvørjir persónar hava rætt til frádrátt.

13. Hesar reglur eru galdandi fyri inntøkuárini 1995, 1996 og 1997.

# 3. Framtaksfelag

Eitt virkið framtaksfelag er tann skipan, ið arbeiðsbólkurin hevur størst álit á, kann virka til frama fyri fleiri arbeiðsplássum í Føroyum, ikki minst sum frá líður. Tað er eisini tann skipan, ið kann skapa tey tryggastu arbeiðsplássini og harvið teir bestu ringvirkningarnar.

Lógargrundarlagið fyriliggur í løgtingslóg nr. 84 frá 30. mai 1994, har landsstýrinum er heimilað at seta upp til 9 mió. kr. í partapeningi í framtaksfelag, ið er skipað sum partafelag, tó ikki meira enn 30% av samlaða partapeninginum. Endamálið við framtaksfelagi, ið landskassin setir pening í, er at virka við til at fremja verkætlanir við stórum útflutningsvirði, og tí skal framtaksfelagið hava vinnuliga, virkisføra leiðslu og starvsfólk, sum kunnu geva serkøna hjálp til tær verkætlanir, felagið fer upp í. Framtaksfelagið skal vera virkið, og felagið skal saman við tí peningi tað setir í vinnuligar verkætlanir geva ráð, veita nevndarlimir og veita vitan um øll neyðug viðurskifti í sambandi við fremjanina av verkætlanini.

Arbeiðsbólkurin leggur dent á, at framtaksfelagnum í lógini er loyvt at átaka sær at veita ráðgeving um vinnufremjandi skipanir í Føroyum og aðrastaðni. Við hesum kann vera gjørligt at leggja umsitingina av vinnufremjandi skipanum til framtaksfelagið og umsiting hennara, sbr. samskipan av av verandi og nýggjum skipanum.

Tað er ikki gjørligt at seta allar heimilaðu 9 mió. kr. í framtaksfelagið beinanvegin, tí peninga- og fíggjarstovnarnir halda tað vera neyðugt at byrja framtaksfelagið í smáum, men bæðir fíggjar- og peningastovnarnir og arbeiðsbólkurin halda tað vera av týdningi, at framtaksfelagnum verður tryggjað fíggjarlig orka til at seta serkønu umsitingina. Ein part av fíggjarligu orkuni kann framtaksfelagið fáa av rentuinntøkum av játtanum til vinnufremjandi skipanir, men herumframt er helst neyðugt at veita umsitingini av framtaksfelagnum eina serliga játtan, ið kanska kundi verið veitt fyri 1995 av óbrúktum játtanum til arbeiðsskapandi endamál á fíggjarlógini fyri 1994. Arbeiðsbólkurin metir hesa ískoytis upphædd liggja um 1½ mió. kr.

Dentur eigur at vera lagdur á, at partapeningur í framtaksfelagið kemur frá

* fíggjar- og peningastovnunum
* arbeiðsgevarafeløgum og vinnufeløgum
* verkamannafeløgum, herundir fiskimannafeløgum og starvsmannafeløgum
* fyritøkum og einstaklingum

umframt frá landsstýrinum.

Um treytin um vinnuliga, virkisføra leiðslu verður sett sera frammaliga við val av nevndarlimum, heldur arbeiðsbólkurin tað ikki vera neyðugt við fleiri reglum fyri framtaksfelagið.

# 4. Samskipan av verandi og nýggjum skipanum

Í arbeiðssetninginum undir "Nýtslan av játtanum á fíggjarlógini til arbeiðsskapandi endamál" verður sagt, at meginhugsanin her er, at øll játtanin fyri 1994 veruliga verður brúkt til sítt ætlaða endamál. Eisini verður nortið við spurningin, um lógin fyri ábyrgdargrunnin skal broytast. Hesir spurningar verða viðgjørdir niðanfyri umframt spurningurin um at samskipa tær ymsu verandi skipanirnar umframt tær nýggju skipaninar, sum verða skotnar upp í frágreiðingini.

## 4.1 Verandi skipanir

1. Stuðul til menning av fiskivinnu á landi

Helst ongin orsøk til broyting, sí tó undir "Felags umsiting"

2. Ábyrgdargrunnurin

Skotið verður upp at strika § 7 og umhugsa 2. punktum í § 4, stk. 4, sí annars undir "Felags umsiting".

3. Grunnurin til ídnaðarfremjandi endamál

Skotið verður upp at broyta mannagongdina viðv. játtan av stuðli og lánum, sí annars undir "Felags umsiting".

4. Íleggingargrunnurin

Um ikki reglugerðin frammanundan kann metast at geva heimild til at lána til vinnuna, sum bólkurin skjýtur upp, verður mælt til at reglugerðin verður broytt samsvarandi hesum.

## 4.2 Felags umsiting

Skotið verður upp, at sama nevnd, sum verður vald av Føroya landsstýri, umsitir og avgerð

játtanir viðv. hesum skipanum:

* Stuðul til menning av fiskivinnu á landi
* Ábyrgdargrunnurin
* Grunnurin til ídnaðarfremjandi endamál
* Skattaendurgjald fyri nýggjar vinnur
* Lán úr grunni, har fæið er lánt úr Íleggingargrunninum

Hetta verður skotið upp fyri

**at** gera skipanirnar meira smidligar
**at** skipanirnar skulu samvirka
**at** gera tað lagaligari hjá umsøkjarum
**at** veita avvarandi eina heildarmynd av tørvi og játtanum

Umráðandi er, at sett verður ein kompetent nevnd at umsita skipanirnar. Nevndin fær heimild at avgera, hvat virksemi kemur undir skipanina og treytir fyri at fáa endurgjald/stuðul/lán. Nevndin fær heimild at útvega sær umsitingarhjálp. Avgerðirnar hjá nevndini kunnu ikki kærast inn fyri annan stovn. Nevndin ger reglugerð fyri virksemi sítt. Reglugerðin verður góðkend av landsstýrinum.

Nevndin, ið er mannað við 5 limum, verður vald soleiðis:

Føroya Landsstýri velur 1 lim
Fíggingarstovnarnir velja 1 lim
Tryggingarsamband Føroya velur 1 lim
Løntakarafeløgini velja 1 lim
Arbeiðsgevarafeløgini velja 1 lim

Nevndin umsitir allar skipanirnar sambært løgtingslógum, kunngerðum, reglugerðum góðkendum av landsstýrinum og føstum játtanum og skuldi títamarhald verið á upphæddunum, sum játtaðar verða, umframt til hvørji endamál játtanirnar verða latnar.

Eisini umboðar nevndin sjónarmiðini so breitt sum tilber, uttan at nevndin verður ov stór, og uttan at upplagdur møguleiki skuldi verið fyri, at ávísir partar majorisera hvønn annan.

# 5. Skattaendurgjald fyri nýggjar vinnur

Princippið í hesum endurgjaldi kann vera einfalt nokk, t.d. at 28% av útgoldnari løn verður endurgoldið arbeiðsgevaranum. Tann trupli spurningurin er at definera, hvat er nýggjar vinnur, og hvussu kann skil haldast á, tá "nýggjar" og "gamlar" vinnur fara fram á sama arbeiðsplássi ella fyritøku.

Sambært skjølunum "ÚTKAST TIL SKITSU FYRI EIN ARBEIÐSSKAPANDI POLITIKK" og "ARBEIÐSSETNINGUR FYRI ARBEIÐSBÓLK" so skal havast m.a. fyri eyga í lógaruppskotinum viðv. "skattaendurgjald" fyri nýggjar vinnur

**at** 28% av lønarútreiðslunum verða afturgoldnar arbeiðsgevaranum
**at** skipanin skal vera tíðaravmarkað t.d. 3 ella 4 ár
**at** skipanin bert skal nýtast til veruliga nýggjar vinnur
**at** tryggjast skal rættvísi viðv. definitiónini av hvørjum vinnum, sum skulu vera umfataðar av lógini
**at** skipanin ikki skal kosta landskassanum nakað
**at** ein nevnd kann umsita skipanina

## 5.1 Nýggjar vinnur

Havandi í huga omanfyri nevndu karmar verður skotið upp at "nýggjar" vinnur hava hesi eyðkenni:

1) Útflutningsfremjandi
2) Kappast ikki um marknað og rávøru
3) Framleiðir nýggjar vørur og tænastur

ad 1) Skotið verður upp at skipanin bert skal galda fyri útflutningsfremjandi virksemi, tí tað er fremst her, tørvur er á stuðli. Her verður t.d. hugsað um flutning, marknaðarføring og aðrar serligar byrjunartrupulleikar og eykaútreiðslur, tá farast skal undir útflutning.

Tað skal eisini vera møguligt at selja á føroyska heimamarknaðinum, sí tó ad 2).

ad 2) Ansast má eftir at nýggja virksemið ikki kappast við verandi virksemi, hvørki um marknað ella rávørur.

Viðvíkjandi marknað so skal ansast eftir, at kappingaravlaging hvørki fer fram á føroyska ella útlendska marknaðinum. Neyðugt er eisini at hava í huga føroyska marknaðin, tí ikki ber til at siga, at tað er ikki loyvt at selja á føroyska marknaðinum yvirhøvur. Eitt slíkt fyrivarni hevur helst minni týdning at hava í huganum viðv. vøruframleiðslu, enn tá tað snýr seg um tænastur, har roknast má við, at føroyski marknaðurin hevur lutfalsliga størri týdning.

Viðvíkjandi kapping um rávøru, so er týdningarmikið, at nýggja virksemið ikki avlagar kappingina um rávøruna, sum verandi virki virka burtur úr, soleiðis at úrslitið av nýggja virkseminum bert er ein flyting av arbeiðsplássum frá gomlu virkjunum yvir til nýggja virksemið. Hinvegin so kann onkur nýggj framleiðsla metast at vera eitt slíkt frambrot, og at kappingin um rávøruna er so lítið avlagandi, at mett verður rætt at lata virksemið koma undir nýggju skipanina.

ad 3) Fyri at vøruframleiðsla ella tænasta kunnu metast at vera nýggj, mugu ávísar treytir vera uppfyltar, m.a. hesar:

* Vøra ella tænasta, ið fyrr bert hevur verið framleidd til heimamarknaðin, men sum nú eisini skal útflytast.

* Vøruframleiðslan ella tænastan skal ikki bert vera smávegis broyting av verandi framleiðslu ella tænastu, men skulu tær vera grundaðar á eitt nýtt koncept.

* Vøruframleiðsla grundað á nýggja rávøru.

* Vøruframleiðslan kann vera kend framleiðsla grundað á kenda rávøru, men at rávøran verður útvegað so, at hon ikki er í kapping við verandi rávøru.

## 5.2 Eftirlit

Ein trupulleiki viðv. eftirliti við skipanini er at tryggja, at nýggja virksemið bert fær endurgjald til lønir, sum veruliga fara til nýggja virksemið.

Viðgjørt hevur tí verið undir hvørjum formi nýggja framleiðslan skal fara fram, um hetta bert skal vera í nýggjum partafeløgum og í serligum hølum bert til hetta endamál. Verður kravt at bert partafeløg stovnaði til endamálið koma undir skipanina, so stovna verandi partafeløg - óneyðugt - bert nýggj partafeløg. Og verður kravt serlig hølir til framleiðsluna, so verða gjørdar meira ella minni óhepnar sundurskildringar, sum allíkavæl ikki tryggja sundurskiljing av framleiðslunum.

Nevndin er tí komin til ta niðurstøðu, at útgjaldingin skal vera treytað av:

* At serskildur roknskapur verður gjørdur fyri virksemið, ið fær endurgjald.

* At viðkomandi partafelag fult út lýkur tey krøv, ið sett verða til roknskap og bókhald í roknskaparlógini og í kunngerð um minstukrøv til bókhald og roknskap.

* At arbeiðsseðlar eru til skjals, ið vísa, hvat arbeitt hevur verið við hvønn dag. Hesir seðlar verða váttaðir av arbeiðsleiðara og løntakara.

* Virksemið fær loypandi endurgjald, t.d. hvønn mánaða sambært váttan frá løggildum grannskoðara.

## 5.3 Umsiting

Omanfyri er lýst hvørjar treytir skulu lúkast fyri at koma undir skipanina um endurgjald viðv. nýggjum virksemi. Men roknast má við, at ivamál koma at stinga seg upp bæði viðvíkjandi hvørjar vinnur kunnu koma undir skipanina, umframt umsitingarligir spurningar.

Tað er tí umráðandi, at sett verður ein kompetent nevnd at umsita skipanirnar. Nevndin fær heimild at avgera, hvat virksemi kemur undir skipanina og treytir fyri at fáa endurgjald/stuðul/lán. Nevndin fær heimild at útvega sær umsitingarhjálp. Avgerðirnar hjá nevndini kunnu ikki kærast inn fyri annan stovn. Nevndin ger reglugerð fyri virksemi sítt. Reglugerðin verður góðkend av landsstýrinum.

Nevndin, ið er mannað við 5 limum, verður vald soleiðis:

Føroya Landsstýri velur 1 lim
Fíggingarstovnarnir velja 1 lim
Tryggingarsamband Føroya velur 1 lim
Løntakarafeløgini velja 1 lim
Arbeiðsgevarafeløgini velja 1 lim

## 5.4 Alternativ

Um mett verður at omanfyri lýsta skipan er ov víttfevnandi, kundi ein skipan verið grundað á nýggjar útflutningsfyritøkur, sum ikki framleiða fiskavørur.

Hetta hevði verið ein aktivur háttur at gjørt føroyska vinnu meira fjølbroytta.

# Skjøl

ARBEIÐSSETNINGUR FYRI ARBEIÐSBÓLK.

Á landsstýrisfundi tann 27.september 1994 varð samtykt at seta ein arbeiðsbólk at fyrireika tey hugskot, sum vóru sett fram í upplegginum "Útkast til skitsu fyri ein arbeiðsskapandi politikk", til ítøkilig uppskot at leggja fyri løgting og landsstýri. Roknað verður við, at landsstýrismaðurin í ídnaðarmenning luttekur í nevndararbeiðnum í tann mun hetta verður mett at vera gagnligt.

Her verður gjørd ein nærri útgreining av arbeiðssetninginum hjá bólkinum. Uppgávan verður fylgjandi fyri teir ymsu partarnar av upplegginum:

**Skattaendurgjald fyri nýggjar vinnur.**

Her skal gerast eitt lógaruppskot at leggja fyri landsstýrið og løgtingið. Sum sagt skal hetta uppskotið ikki føra við sær útreiðslur ella minniinntøkur fyri landskassan í mun til verandi arbeiðspláss og harvið inntøkugrundarlag hjá tí almenna. Tí skal lógin tryggjað, at hetta heldur ikki hendir.

Ein spurningur verður at definera hvørjar vinnur, ið skulu vera umfataðar av lógini. Og so er spurningurin hvussu vit finna eina mannagongd, sum tryggjar størst møguligt "rættvísi" í hesum. Hetta skal eisini vera útgreinað í lógini. T.d. kundi hugsast ein nevnd, sum kemur at taka hesa avgerð.

**Skattafrádráttur fyri partapening.**

Her skal úrslitið somuleiðis verða ein lóggáva. Og hon var annars fyri ein part fyrireikað av skattanevndini undan løgtingsvalinum. Men við hesi lóggávu skal eisini metast, hvat hon kostar í fyrsta umfari, og í hvønn mun hon og hvussu skjótt hon kann koma at svara seg aftur. Annars skal við hesi lóggávu tryggjast, at hetta ikki verður ein nýggjur "skattafidusur", men at tað veruliga verður talan um eina skipan, sum kemur at menna vinnulívið á ein slíkan hátt, at tað kemur at loysa seg samfelagliga.

**Nýtslan av játtanum á fíggjarlógini til arbeiðsskapandi endamál.**

Meginhugsanin her er, at øll játtanini fyri 1994 veruliga verður brúkt til sítt ætlaða endamál. Hetta má m.a. merkja, at óbrúktar játtanir í 1994 verða fluttar til 1995. Hetta kann hava týdning, tí á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1995 eru hesar játtanir munandi skerdar.

Ein annar spurningur er játtanin til ábyrgdargrunnin. Spurningurin er um lógin skal broytast, avtakast ella vera sum hon er. Skal hon vera sum hon er, eiga aðrar heimildir at verða funnar at fáa nýtt avsettu játtanina.

Metast eigur eisini um nyttuna av hesi lóg. Hin kann jú gerast ein nærliggjandi møguleiki hjá peningastovnunum at útvega sær eina eyka trygd, sum teir kanska kundu liva fyriuttan.

**Lánimøguleikar úr Íleggingargrunninum.**

Verandi reglur eiga at verða endurskoðaðar, og uppskot eigur at verða gjørt um reglur fyri grunnin, sum eru grundaðar á útlán til vinnulig endamál.

**ÚTKAST TIL SKITSU FYRI EIN ARBEIÐSSKAPANDI POLITIKK.**

Tann politiski setningurin hjá hesi samgonguni er m.a., at útvega samfelagnum størri inntøkur og at skapa nýggj arbeiðspláss. Um endamálið við vinnupolitikkinum verður sagt, at tað er at troyta alt tað tilfeingið, sum kann geva samfelagsligan vinning. At røkka hesum máli verða sum skjótast skaptir útvegur, sum kunnu stimbra tílíkum virksemi. Hesar ætlanir kunnu m.a. verða grundaðar á tilmælið hjá "Arbeiðsskapandi Nevndini" og álitið "Karmar um føroyskt vinnulív."

Kanningar og metingar vísa, at tað uttan iva eru møguleikar fyri nýggjum vinnum, bæði á sjógvi og landi, og bæði innan og uttanfyri fiskivinnuna. Men tað eru somuleiðis greitt, at landsstýrið má leggja út við einum vinnupolitikki, hvørs endamál skal vera at fáa gongd á útvegan av vinnuligum arbeiðsplássum. Ein slíkur vinnupolitikkur má eisini vera bygdur á ótraditionellar loysnir og á stig, sum vanliga ikki vildu verið nýtt. Hetta merkir, at landsstýrið eigur at hava ein aktivari leiklut enn vit hava sæð seinastu árini.

Tað má eisini metast at vera týdningarmikið, at landsstýrið sum skjótast spælir út við einum slíkum politikki. Lutvíst fyri at vísa fólkinum í landinum, at tað kann vænta, at nakað fer nú at henda. Men eisini fyri at hava eitt slíkt upplegg tilreiðar, tá landsstýrið skal hitta donsku ríkisstjórnina um stutta tíð. Tá er tað av týdningi av sannføra danir um, at vit veruliga eru við at føra ein politikk, sum skal loysa teir grundleggjandi trupulleikarnar hjá samfelagnum.

Niðanfyri er sett upp hugskot um tey tiltøk, sum landsstýrið eigur at seta í verk sum skjótast í royndunum at fáa nýggj arbeiðspláss. Samstundis eigur ein meira langsiktaður politikkur at verða fyrireikaður.

Eg mæli til fylgjandi stig, sum lutvíst skulu vera framd sum lógarsmíð og lutvíst umsitingarliga í tann mun hetta er møguligt.

**1. Skattaendurgjald fyri nýggjar vinnur.**

Hetta uppskot er tikið beinleiðis úr álitinum "Karmar um føroyska vinnu". Endamálið við hesum uppskoti er at lækka um lønarútreiðslurnar í fyrsta umfari fyri nýggjar vinnur. Hetta verður gjørt á tann hátt, at ein partur av skattinum, uppskot hevur verið um 28% av inntøkuni, verður endurrindað arbeiðsgevaran, hvørs lønarútreiðslur tískil verða minkaðar samsvarandi. Hetta skuldi gjørt tað munandi lættari at komið í gongd og at fáa fígging. Ætlanin er so, at hetta endurgjaldið skal verða avtrappað eftir einum áramáli, nevnd hava verið 3 ella 4 ár, tá t.d. kapitalútreiðslurnar eru minkaðar so nógv, at javnvág skuldi verðið í rakstrinum. Í hvussu er skuldi tá verið grundarlag fyri tí víðari rakstrinum.

Hetta er ein skipan, sum sjálvsagt skal vera nýtt varisliga, soleiðis at vissa verður fyri, at hon bert verður nýtt fyri veruliga nýggjar vinnur. Men hetta má kunna tryggjast í løggávuni hesum viðvíkjandi.

Hinvegin er hetta ein skipan sum ikki kemur at kosta nakað, og sum tí ikki nýtist at koma á fíggjarlógina. Tí grundsjónarmiðið er jú tað, at verður einki gjørt koma eingi nýggj

arbeiðspláss. Men við hesum stigi koma vit beinleiðis at økja um inntøkurnar til samfelagið og harvið eisini hjá landskassanum.

Í "Karmum um føroyska vinnu", sum er hjáløgd, skjali 2, verður greitt nærri frá hvussu henda skipan ætlast at koma at virka og frá grundsjónarmiðnum aftanfyri hana.

Her eigur fyrireiking til eina lóggávu at vera sett í verk beinanvegin.

**2. Samskipan við ALS.**

Henda skipan kann enntá samskipast við Arbeiðsloysistrygginina sum longu hevur reglur fyri stuðul til nýggj arbeiðspláss í einum 3 mánaðar skeiði, sum møguliga kann leingjast. Henda skipan eigur tískil at verða ein partur av neyðugu politikkinum á hesum økinum og eiga samráðingar at verða tiknar upp við stýrið fyri ALS um hetta.

**3. Skattafrádráttur fyri partapening.**

Nýggjar vinnuætlanir koma at krevja rættuliga stóran eginpening í mun til tað sum talan var um fyrr. Hinvegin vita vit, at føroyingar eru til reiðar at seta pening í sítt egna arbeiðspláss. Tað ber til at stimbra hesum við at loyva skattafrádrátt fyri partapening í fyritøkur, hvørs endamál er produktiv arbeiðspláss.

Hesin frádráttur skal sjálvsagt vera avmarkur, og tryggjast má, at hetta ikki verður ein nýggjur "skattafidusur". Men hinvegin er neyvan ivi um, at í tann mun, sum ein slík skipan kann stimbra virkishugin hjá einstaklinginum, kemur hon eisini at vera ein týdningarmikil partur í hesum ætlaða politikkinum.

Ein slík skipan nýtist heldur ikki at koma á fíggjarlógina. Tað er neyvan ivi um, at ein evt. minniinntøka til landskassan av hesum frádrátti verður meira enn uppvigað av teimum skattainntøkum, sum skipanin kemur at geva av sær.

Her er neyðugt við eini lóggávu, sum eigur at verða fyrireikað beinanvegin.

**4. Nýtsla av játtanum á fíggjarlógini til arbeiðsskapandi endamál.**

Tað er neyvan ivi um, at ein munandi forðan fyri nýggjum vinnum eru trupulleikarnir av at fáa tað neyðugu fíggingina. Her er trupulleikin tann, at peningastovnarnir lærdir av skaða eru sera varnir við at fíggja ætlanir, sum ikki eru 100% "bærbare". Hinvegin vita vit, at sum støðan prinsipielt er í fiskivinnuni vil altíð vera ein ávís óvissa við eini og hvørji ætlan.

Tí slepst ikki undan, at tað almenna í ein ávísan mun kemur inn í myndina við útvegan av peningi, á ein ella annan hátt, til nýggjar verkætlanir. Okkara grundstøða má vera tann, at arbeiðspláss, sum kunnu geva íkast í samfelagið, eiga at fáa ein tjans. Í hesum sambandi er tað jú heppið, at nógv av teimum arbeiðsplássum, sum kunnu útvegast, eru "bílig" í íløgu, og tí eiga ætlanir, sum hava ein rímiligan møguligan møguleika at bera seg eisini at fáa ein møguleika, evt. við beinleiðis luttøku av tí almenna.

Og í hesum sambandi er tað eisini so heppið, at peningur er tøkur sum kann verða nýttur í hesum sambandi.

Fyrst er at nevna, at á fíggjarlógini eru fleiri upphæddir avsettar til arbeiðsskapandi endamál, sum als ikki verða nýttar. Her kann nevnast játtanin til veðhaldsgrunn uppá 25 mill.

sum stórt sæð enn er óbrúkt, tí lógin er so avmarkandi, at ongar ætlanir kunnu lúka tær treytir. Tað sama er galdandi fyri aðrar játtanir. T.d. er játtanin til "varðveiting av fjølbroyttum flota" lítið brúkt. Men her eru ikki so frægt sum reglur fyri, hvussu hon skal nýtast.

Her er neyðugt við eini lóggávu, sum gevur landsstýrinum heimild til at nýta játtanirnar til arbeiðsskapandi endamál, har lóggávan er ov restriktiv til at játtanin verður nýtt. Játtanarmyndugleikin kundi so verið lagdur til eina skjóttarbeiðandi "ekspertnevnd", og kriteriið fyri játtan skuldi verið -foreinklað sagt- um væntast kundi at givni stuðulin fer at koma samfelagnum vinning.

**5. Lánimøguleikar úr íleggingargrunninum.**

Ein liður í royndunum at lætta um fíggingarmøguleikarnar hjá vinnuni kundi verið Íleggingargrunnurin - gamli 60 mill. grunnurin. Hann er upprunaliga ætlaður til íløgur í samskifti. Men sum eg havi skilt geva viðtøkurnar eisini møguleikar fyri fígging av vinnuni. Í grunninum standa í løtuni 140 mill.kr., og kundu hesar muna væl í uppbyggingini av einum nýggjum vinnulívi.

Fíggingin kundi t.d. verið grundað á hvussu nógv nýggj arbeiðspláss sum eru í ætlanini. Upphæddin kundi t.d. verið kr. 50.000 pr. arbeiðspláss. Ein verkætlan við t.d. 30 arbeiðsplássum kundi so givið ein lánimøguleika uppá 1,5 mill.

**6. Fríhavn.**

Vit eiga beinanvegin at fara í holt við at seta á stovn fríhavn(ir). Vinnulívsmenn meta, at hetta kann fara at lætta munandi um hjá vinnuni, og royndir aðra staðni frá vísa, at fríhavnsøki kunnu gera tað møguligt at fáa útlendskar íløgur og harvið arbeiðspláss til landið. Her eigur Toll- og Skattastovan at verða biðin um at gera tær neyðugu kanningarnar.

**7. Útlendskar íløgur.**

Vit eiga beinanvegin at gera kanningar av hvat ið skal gerast fyri at fáa útlendskar íløgur til Føroya. Fríhavn kundi verið eitt stig henda vegin. Men møguleiki eigur eisini at verða kannaður fyri øðrum sømdum, sum kann veitast útlendskum investorum.

Orsøkin til at hetta er áhugavert er, at eg longu havi samband við fólk, sum eru við at kanna hetta.

**8. Samskipan av arbeiðsskapandi politikkinum.**

Skulu vit hava ein rættuligan miðvísan arbeiðsskapandi politikk er neyðugt við neyvum samstarvi við vinnuna - í breiðari merking. Tí er uppskotið at seta ein "fylgibólk" úr vinnuni, sum skal vera ráðgevandi hjá landsstýrinum í hesum politikki. Bólkurin skal lutvíst vera við til at fylgja teimum her tilmæltu uppskotum upp eins og bólkurin skal arbeiða við øðrum uppskotum, sum eisini kunnu bera í sama borð. Her kann lutvíst vera talan um nýhugsan, men eisini um broytingar í verandi skipanum og reglum, sum sum er kunnu vera forðing fyri arbeiðsplássum.

Í hesum bólki eiga at vera umboð fyri fakfeløg, arbeiðsgevarafeløg, peningastovnar, útflutningsfeløg og einstaklingar, sum verða mettir at hava serligar fyritreytir at gagna sakini.

Ein slíkur bólkur kann saktans setast av landsstýrinum sjálvum, og kann eg sjálvur vera við í hesum bólki.

Hesin bólkur kundi eisini verið ein "hugskotsbanki", har tey hugskot sum komu fram um nýggjar vinnur fingu eina meting.

Óli Jacobsen

ARBEIÐSSETNINGUR FYRI ARBEIÐSBÓLK.

Á landsstýrisfundi tann 27.september 1994 varð samtykt at seta ein arbeiðsbólk at fyrireika tey hugskot, sum vóru sett fram í upplegginum "Útkast til skitsu fyri ein arbeiðsskapandi politikk", til ítøkilig uppskot at leggja fyri løgting og landsstýri. Roknað verður við, at landsstýrismaðurin í ídnaðarmenning luttekur í nevndararbeiðnum í tann mun hetta verður mett at vera gagnligt.

Her verður gjørd ein nærri útgreining av arbeiðssetninginum hjá bólkinum. Uppgávan verður fylgjandi fyri teir ymsu partarnar av upplegginum:

**Skattaendurgjald fyri nýggjar vinnur.**

Her skal gerast eitt lógaruppskot at leggja fyri landsstýrið og løgtingið. Sum sagt skal hetta uppskotið ikki føra við sær útreiðslur ella minniinntøkur fyri landskassan í mun til verandi arbeiðspláss og harvið inntøkugrundarlag hjá tí almenna. Tí skal lógin tryggjað, at hetta heldur ikki hendir.

Ein spurningur verður at definera hvørjar vinnur, ið skulu vera umfataðar av lógini. Og so er spurningurin hvussu vit finna eina mannagongd, sum tryggjar størst møguligt "rættvísi" í hesum. Hetta skal eisini vera útgreinað í lógini. T.d. kundi hugsast ein nevnd, sum kemur at taka hesa avgerð.

**Skattafrádráttur fyri partapening.**

Her skal úrslitið somuleiðis verða ein lóggáva. Og hon var annars fyri ein part fyrireikað av skattanevndini undan løgtingsvalinum. Men við hesi lóggávu skal eisini metast, hvat hon kostar í fyrsta umfari, og í hvønn mun hon og hvussu skjótt hon kann koma at svara seg aftur. Annars skal við hesi lóggávu tryggjast, at hetta ikki verður ein nýggjur "skattafidusur", men at tað veruliga verður talan um eina skipan, sum kemur at menna vinnulívið á ein slíkan hátt, at tað kemur at loysa seg samfelagliga.

**Nýtslan av játtanum á fíggjarlógini til arbeiðsskapandi endamál.**

Meginhugsanin her er, at øll játtanini fyri 1994 veruliga verður brúkt til sítt ætlaða endamál. Hetta má m.a. merkja, at óbrúktar játtanir í 1994 verða fluttar til 1995. Hetta kann hava týdning, tí á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1995 eru hesar játtanir munandi skerdar.

Ein annar spurningur er játtanin til ábyrgdargrunnin. Spurningurin er um lógin skal broytast, avtakast ella vera sum hon er. Skal hon vera sum hon er, eiga aðrar heimildir at verða funnar at fáa nýtt avsettu játtanina.

Metast eigur eisini um nyttuna av hesi lóg. Hin kann jú gerast ein nærliggjandi møguleiki hjá peningastovnunum at útvega sær eina eyka trygd, sum teir kanska kundu liva fyriuttan.

**Lánimøguleikar úr Íleggingargrunninum.**

Verandi reglur eiga at verða endurskoðaðar, og uppskot eigur at verða gjørt um reglur fyri grunnin, sum eru grundaðar á útlán til vinnulig endamál.

**ÚTKAST TIL SKITSU FYRI EIN ARBEIÐSSKAPANDI POLITIKK.**

Tann politiski setningurin hjá hesi samgonguni er m.a., at útvega samfelagnum størri inntøkur og at skapa nýggj arbeiðspláss. Um endamálið við vinnupolitikkinum verður sagt, at tað er at troyta alt tað tilfeingið, sum kann geva samfelagsligan vinning. At røkka hesum máli verða sum skjótast skaptir útvegur, sum kunnu stimbra tílíkum virksemi. Hesar ætlanir kunnu m.a. verða grundaðar á tilmælið hjá "Arbeiðsskapandi Nevndini" og álitið "Karmar um føroyskt vinnulív."

Kanningar og metingar vísa, at tað uttan iva eru møguleikar fyri nýggjum vinnum, bæði á sjógvi og landi, og bæði innan og uttanfyri fiskivinnuna. Men tað eru somuleiðis greitt, at landsstýrið má leggja út við einum vinnupolitikki, hvørs endamál skal vera at fáa gongd á útvegan av vinnuligum arbeiðsplássum. Ein slíkur vinnupolitikkur má eisini vera bygdur á ótraditionellar loysnir og á stig, sum vanliga ikki vildu verið nýtt. Hetta merkir, at landsstýrið eigur at hava ein aktivari leiklut enn vit hava sæð seinastu árini.

Tað má eisini metast at vera týdningarmikið, at landsstýrið sum skjótast spælir út við einum slíkum politikki. Lutvíst fyri at vísa fólkinum í landinum, at tað kann vænta, at nakað fer nú at henda. Men eisini fyri at hava eitt slíkt upplegg tilreiðar, tá landsstýrið skal hitta donsku ríkisstjórnina um stutta tíð. Tá er tað av týdningi av sannføra danir um, at vit veruliga eru við at føra ein politikk, sum skal loysa teir grundleggjandi trupulleikarnar hjá samfelagnum.

Niðanfyri er sett upp hugskot um tey tiltøk, sum landsstýrið eigur at seta í verk sum skjótast í royndunum at fáa nýggj arbeiðspláss. Samstundis eigur ein meira langsiktaður politikkur at verða fyrireikaður.

Eg mæli til fylgjandi stig, sum lutvíst skulu vera framd sum lógarsmíð og lutvíst umsitingarliga í tann mun hetta er møguligt.

**1. Skattaendurgjald fyri nýggjar vinnur.**

Hetta uppskot er tikið beinleiðis úr álitinum "Karmar um føroyska vinnu". Endamálið við hesum uppskoti er at lækka um lønarútreiðslurnar í fyrsta umfari fyri nýggjar vinnur. Hetta verður gjørt á tann hátt, at ein partur av skattinum, uppskot hevur verið um 28% av inntøkuni, verður endurrindað arbeiðsgevaran, hvørs lønarútreiðslur tískil verða minkaðar samsvarandi. Hetta skuldi gjørt tað munandi lættari at komið í gongd og at fáa fígging. Ætlanin er so, at hetta endurgjaldið skal verða avtrappað eftir einum áramáli, nevnd hava verið 3 ella 4 ár, tá t.d. kapitalútreiðslurnar eru minkaðar so nógv, at javnvág skuldi verðið í rakstrinum. Í hvussu er skuldi tá verið grundarlag fyri tí víðari rakstrinum.

Hetta er ein skipan, sum sjálvsagt skal vera nýtt varisliga, soleiðis at vissa verður fyri, at hon bert verður nýtt fyri veruliga nýggjar vinnur. Men hetta má kunna tryggjast í lóggávuni hesum viðvíkjandi.

Hinvegin er hetta ein skipan sum ikki kemur at kosta nakað, og sum tí ikki nýtist at koma á fíggjarlógina. Tí grundsjónarmiðið er jú tað, at verður einki gjørt koma eingi nýggj

arbeiðspláss. Men við hesum stigi koma vit beinleiðis at økja um inntøkurnar til samfelagið og harvið eisini hjá landskassanum.

Í "Karmum um føroyska vinnu", sum er hjáløgd, skjali 2, verður greitt nærri frá hvussu henda skipan ætlast at koma at virka og frá grundsjónarmiðnum aftanfyri hana.

Her eigur fyrireiking til eina lóggávu at vera sett í verk beinanvegin.

**2. Samskipan við ALS.**

Henda skipan kann enntá samskipast við Arbeiðsloysistrygginina sum longu hevur reglur fyri stuðul til nýggj arbeiðspláss í einum 3 mánaðar skeiði, sum møguliga kann leingjast. Henda skipan eigur tískil at verða ein partur av neyðugu politikkinum á hesum økinum og eiga samráðingar at verða tiknar upp við stýrið fyri ALS um hetta.

**3. Skattafrádráttur fyri partapening.**

Nýggjar vinnuætlanir koma at krevja rættuliga stóran eginpening í mun til tað sum talan var um fyrr. Hinvegin vita vit, at føroyingar eru til reiðar at seta pening í sítt egna arbeiðspláss. Tað ber til at stimbra hesum við at loyva skattafrádrátt fyri partapening í fyritøkur, hvørs endamál er produktiv arbeiðspláss.

Hesin frádráttur skal sjálvsagt vera avmarkur, og tryggjast má, at hetta ikki verður ein nýggjur "skattafidusur". Men hinvegin er neyvan ivi um, at í tann mun, sum ein slík skipan kann stimbra virkishugin hjá einstaklinginum, kemur hon eisini at vera ein týdningarmikil partur í hesum ætlaða politikkinum.

Ein slík skipan nýtist heldur ikki at koma á fíggjarlógina. Tað er neyvan ivi um, at ein evt. minniinntøka til landskassan av hesum frádrátti verður meira enn uppvigað av teimum skattainntøkum, sum skipanin kemur at geva av sær.

Her er neyðugt við eini lóggávu, sum eigur at verða fyrireikað beinanvegin.

**4. Nýtsla av játtanum á fíggjarlógini til arbeiðsskapandi endamál.**

Tað er neyvan ivi um, at ein munandi forðan fyri nýggjum vinnum eru trupulleikarnir av at fáa tað neyðugu fíggingina. Her er trupulleikin tann, at peningastovnarnir lærdir av skaða eru sera varnir við at fíggja ætlanir, sum ikki eru 100% "bærbare". Hinvegin vita vit, at sum støðan prinsipielt er í fiskivinnuni vil altíð vera ein ávís óvissa við eini og hvørji ætlan.

Tí slepst ikki undan, at tað almenna í ein ávísan mun kemur inn í myndina við útvegan av peningi, á ein ella annan hátt, til nýggjar verkætlanir. Okkara grundstøða má vera tann, at arbeiðspláss, sum kunnu geva íkast í samfelagið, eiga at fáa ein tjans. Í hesum sambandi er tað jú heppið, at nógv av teimum arbeiðsplássum, sum kunnu útvegast, eru "bílig" í íløgu, og tí eiga ætlanir, sum hava ein rímiligan møguligan møguleika at bera seg eisini at fáa ein møguleika, evt. við beinleiðis luttøku av tí almenna.

Og í hesum sambandi er tað eisini so heppið, at peningur er tøkur sum kann verða nýttur í hesum sambandi.

Fyrst er at nevna, at á fíggjarlógini eru fleiri upphæddir avsettar til arbeiðsskapandi endamál, sum als ikki verða nýttar. Her kann nevnast játtanin til veðhaldsgrunn uppá 25 mill,

sum stórt sæð enn er óbrúkt, tí lógin er so avmarkandi, at ongar ætlanir kunnu lúka tær treytir. Tað sama er galdandi fyri aðrar játtanir. T.d. er játtanin til "varðveiting av fjølbroyttum flota" lítið brúkt. Men her eru ikki so frægt sum reglur fyri, hvussu hon skal nýtast.

Her er neyðugt við eini lóggávu, sum gevur landsstýrinum heimild til at nýta játtanirnar til arbeiðsskapandi endamál, har lóggávan er ov restriktiv til at játtanin verður nýtt. Játtanarmyndugleikin kundi so verið lagdur til eina skjóttarbeiðandi "ekspertnevnd", og kriteriið fyri játtan skuldi verið -foreinklað sagt- um væntast kundi at givni stuðulin fer at koma samfelagnum vinning.

**5. Lánimøguleikar úr íleggingargrunninum.**

Ein liður í royndunum at lætta um fíggingarmøguleikarnar hjá vinnuni kundi verið Íleggingargrunnurin - gamli 60 mill. grunnurin. Hann er upprunaliga ætlaður til íløgur í samskifti. Men sum eg havi skilt geva viðtøkurnar eisini møguleikar fyri fígging av vinnuni. Í grunninum standa í løtuni 140 mill.kr., og kundu hesar muna væl í uppbyggingini av einum nýggjum vinnulívi.

Fíggingin kundi t.d. verið grundað á hvussu nógv nýggj arbeiðspláss sum eru í ætlanini. Upphæddin kundi t.d. verið kr. 50.000 pr. arbeiðspláss. Ein verkætlan við t.d. 30 arbeiðsplássum kundi so givið ein lánimøguleika uppá 1,5 mill.

**6. Fríhavn.**

Vit eiga beinanvegin at fara í holt við at seta á stovn fríhavn(ir). Vinnulívsmenn meta, at hetta kann fara at lætta munandi um hjá vinnuni, og royndir aðra staðni frá vísa, at fríhavnsøki kunnu gera tað møguligt at fáa útlendskar íløgur og harvið arbeiðspláss til landið. Her eigur Toll- og Skattastovan at verða biðin um at gera tær neyðugu kanningarnar.

**7. Útlendskar íløgur.**

Vit eiga beinanvegin at gera kanningar av hvat ið skal gerast fyri at fáa útlendskar íløgur til Føroya. Fríhavn kundi verið eitt stig henda vegin. Men møguleiki eigur eisini at verða kannaður fyri øðrum sømdum, sum kann veitast útlendskum investorum.

Orsøkin til at hetta er áhugavert er, at eg longu havi samband við fólk, sum eru við at kanna hetta.

**8. Samskipan av arbeiðsskapandi politikkinum.**

Skulu vit hava ein rættuligan miðvísan arbeiðsskapandi politikk er neyðugt við neyvum samstarvi við vinnuna - í breiðari merking. Tí er uppskotið at seta ein "fylgibólk" úr vinnuni, sum skal vera ráðgevandi hjá landsstýrinum í hesum politikki. Bólkurin skal lutvíst vera við til at fylgja teimum her tilmæltu uppskotum upp eins og bólkurin skal arbeiða við øðrum uppskotum, sum eisini kunnu bera í sama borð. Her kann lutvíst vera talan um nýhugsan, men eisini um broytingar í verandi skipanum og reglum, sum sum er kunnu vera forðing fyri arbeiðsplássum.

Í hesum bólki eiga at vera umboð fyri fakfeløg, arbeiðsgevarafeløg, peningastovnar, útflutningsfeløg og einstaklingar, sum verða mettir at hava serligar fyritreytir at gagna sakini.

Ein slíkur bólkur kann saktans setast av landsstýrinum sjálvum, og kann eg sjálvur vera við í hesum bólki.

Hesin bólkur kundi eisini verið ein "hugskotsbanki", har tey hugskot sum komu fram um nýggjar vinnur fingu eina meting.

Óli Jacobsen